# TILTØK

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 eisini Møti, har Ragnar Niclasen, trúboðari á Filipsoyggjunum talar. Øll eru vælkomin. www.hebron.fo

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 22. mai kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á Familjumøtinum kl. 10.30 sigur Poul Joensen frá trúboðaravirkinum á Papua Ný Guinea. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Zachariassen um evnið: »Hvat lærir Bíblian um at geva«. Barnaansing fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini. Týskvøldið kl. 20 Bøn og bíbiltími. www.livdin.fo

**Samkoman Rhema**
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli. www.rhema.fo

**Frá Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Rúna Rasmussen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC: Evnið er »At verða leiddur av Heilaga Andanum«. 2. partur v/ Jaspur Johannesen, kl. 18 Sjónvarpsmøti í Evangeliihúsinum. Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin v/ Annu Guttesen. www.filadelfia.fo

**Katólska kirkjan**
Sunnudagin kl. 11 Hámessa v/ Andrzej Sydrzynski, prestur í Mariukirkjuni. Kl. 14 Sunnudagsskúli.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman: Hans Jacob Joensen bispur greiðir frá vitjan hjá biskoppinum í Karagwe stift í Tansania.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti við Fríðbjørn Poulsen, Helgi Henriksen talar. Verð hjartaliga vælkomin í Saron.

**Sandavágur**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli. Eini møti verður í Sandavági, av tí at felagsmøti verður í Missiónshúsinum í Sørvági fyri alla oynna. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Miðvágs missiónshús**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Felagsmøti í Missiónshúsinum í Sørvági. Leikur frá ársmøtinum verður framførdur og Streingjakórið syngur.

**Nesvík**
Felagsmissiónsvikan heldur áfram í kvøld við bønarmøti kl. 19 og Møti kl. 19.30 við Regin Høgnesen úr Leirvík, Menn av Strondum syngja, innsavnan. Sunnudagin kl. 15 Felags sunnudagsskúli/familjumøti við Birnu Petersen o.ø. úr Havn, kl. 17 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Árna Jaocbsen úr Leirvík, sangbólkur úr Norðurstreymoy syngur, innsavnan.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og kl. 19 Evangel. møti. Flemming Berg og Torben Søndergaard luttaka á øllum møtunum. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Einki opið hús leygarkvøldið vegna møtini í Lívsins Orð, Runavík. Sunnudagin kl. 17 Møti við Hjørdis H. Petersen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Tabor, Toftir**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20 við sangi og vitnistøtu. Missiónshúsið er opið til umleið kl. 24. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Manskórinum í Vágum. Ársgávan til Heimamissiónina verður savnað inn. Aftaná møti verður felags náttúrði.

**Missiónshúsið í Leirvík.**
Sunnudagin møti kl.18, tey ungu skipa fyri.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Peter O. K. Olofson. Ungdómsmøti kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 11 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Preben Hansen og aðrir tala.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Evangel. møti á Húsum á Kalsoynni**
Leygardagin kl. 14 Barnamøti, kl. 16 Útimøti – um viðrar – kl. 20 Evangel. møti. Sunnudagin kl. 14 Barnamøti, kl. 16 Útimøti – um viðrar – Herman og Gigga syngja, Tórmund og fleiri luttaka.

**Missiónshúsið í Skopun**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Jon Eli Johannesen. Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsangur, kl. 18 Møti v/ Jon Eli Johannesen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 Smáir einglar møta, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Stríðsmenn møta. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti. Vælkomin í Betania.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin. Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jónsvein Bech. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin. Mánakvøld Bønarmøti kl. 21 og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 24. mai.***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Veving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, dart og onnur spøl
***Túrur til Eiðis mikudagin 26. mai kl. 10 úr Steinatúni, vitjað verður glassmiðjuna hjá Elisabeth og Páll Ellingsgaard, síðani verður døgurði í Lonini á Eiði. Aftur í Havnini uml. kl. 16. Kostnaður 150,- gjaldast áðrenn kl. 12, 24. mai. Tilm. 316491.***
***Týsdagur 25. mai***
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Ábyrgd fyri egnari heilsu, Jógvan Fríðriksson, prestur
***Mikudagur 26. mai***
Tilhaldið stongt.
***Hósdagur 27. mai***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum

## GULLBRÚDLEYP

Sunnudagin 4. juli hava hjúnini Jóna og Hans Jacob Andreasen, Klaksvík, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin í Tekniska skúla í Klaksvík leygardagin 3. juli kl. 16.00. Tey, sum vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í veitslu,verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 455782 ella 456772 innan 21. juni.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 15. mai, Runavík tlf. 44 70 10
Sunnudagin 16. mai, Runavík tlf. 44 80 16

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Tí at annan grundvøll kann eingin leggja enn tann, sum langdur er, og hann er Jesus Kristus.*
*1. Kor. 3,11*

Við Jesu deyða og uppreisn er ein grundvøllur lagdur. Við Jesu deyða og uppreisn hevur Gud sigrað á tí ónda. Sigurin er vunnin. Og grundvøllurin er lagdur, fundamentið er lagt undir okkara lívi og tilveru.

Hesin sigur gjørdist okkara í okkara heilagu dópsstund og hvørja ferð vit í trúgv sigja ja til at byggja á henda sigur.

Tað er hetta gleðiboðskapurin boðar okkum. Grundvøllurin er lagdur. Og vit eiga hvønn dag at lata okkum sannføra til trúgv, kærleika og vón av orðinum, sum boðað verður. Vit eiga hvønn dag at byggja á grundvøllin, Kristus. Og tá vit hoyra hin glaða boðskapin boðaðan, fáa vit megi og kraft og inspiratión til at liva kærleikan lív í heiminum. Trúgv okkara er føst og óvikandi, tí hon er bygd á Kristus og tað vil siga á kærleikan. Hesin kærleiki var krossfestur langafríggjadag, men reis uppaftur páskamorgun. Gud sigrar altíð á tí ónda. Hann er sterkur, tá hann er veikur, hann opinberar seg undir sínum mótsetningi. Og tað merkir, at tá alt tykist vónleyst og alt tykist at vera tapt, tá sigar Gud.

Tað var hetta, sum hendi á krossinum. Vit eru sum kristin sett at bera Kristi sigur ´víðari til onnur, tí vit eru Guds armar í heiminum. Gud nýtir okkum til at bera tað góða til onnur. Sigurin er vunnin. Og grundvøllurin er lagdur. Og vit hava dópin og trúnna, vit hava andan og orðið og sakramentini. Og vit hava kærleikan og vónina.

Okkara uppgáva er at bera hetta til onnur. Soleiðis bera vit ein neista av Guds góðsku, kærleika og vón til onnur. Og tað er okkara uppgáva at gera tað!

**David Johannesen, prestur**


**Keypssamtøkan í Hoyvík**

# Slaktari

Søkt verður eftir slaktara til slaktaradeildina í Keypssamtøkuni í Hoyvík, at byrja uml. 7. juni 2004, ella eftir avtalu.

Talan er um fulltíðarstarv.

Handverkaraløn.

Meira fæst at vita um starvið hjá slaktarameistaranum, Lars Hansen tlf. 314149.

Umsókn skal sendast til

**FK Hoyvík**
**Box 349**
**188 Hoyvík**

innan 26. mai 2004.




# TILTØK

***Fríggjadagur 28. mai***
kl. 10-12 Handverk, øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 12-17 Opið hús
***Fyrireika søluna í Grasagarði av sjálum.***

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 23. mai verður gongutúrur eftir Saksunarvegnum (bygdagøtan Vík-Saksun). Miðal tungur túrur, gingið verður 3-4 tímar. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensiónistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
***Mánadagin 24. mai***
Boccia v/ Jóhan Danielsen
***Týsdagin 25. mai***
Ítriv fyri áhugað
***Mikudagin 26. mai***
Helen og Eyðun Joensen greiða frá túri á Hawaii
***Hósdagin 27. mai***
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
***Fríggjadagin 28. mai***
Opið hús

*Tú fært altíð ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks.*

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur límafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meiningheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.acadanmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/˜aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).


# TYRLUTÆNASTAN
## HJÁ ATLANTIC AIRWAYS

## Tyrluflúgvingin á Hvítusunnu

Flogið verður 2. Hvítusunnudag sum sunnudag.
Flogið verður ikki 1. Hvítusunnudag.

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel 34 10 60 · Faks 34 10 01 · tyrlan@atlantic.fo
www.atlantic.fo

## KUNDARÁÐGEVAR TIL TÓRSHAVN OG VÁGAR

Søkt verður eftir kundaráðgevum til deildirnar í Tórshavn og í Vágum.

Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinarligasti peningastovnur í Føroyum. Vit ynska at veita kundum okkara ta bestu ráðgevingina og tænastuna.

Í starvinum sum kundaráðgevi verður dentur lagdur á heildarráðgeving og sølu, t.v.s. at ráðgivið verður um øll viðurskifti av týdningi fyri kundan, m.a. innlán, útlán, pensjón, íløgur, tryggingar og gjaldsmiðling.

Uppgávurnar hjá kundaráðgevunum eru m.a.:

- ábyrgd og røkt av egnari kundaportufølju
- heildarráðgeving og søla
- kredittviðgerð
- ymiskar ad hoc-uppgávur

Vit ynskja okkum starvsfelagar, ið hava góð samstarvsevni og hava hug og evni at arbeiða við kundum.

Kundaráðgevarnir mugu hava góð evni at umstilla seg í einum broytiligum umhvørvi.

Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving, eitt nú peningastovnsútbúgving við Finansiel Videreuddannelse ella líknandi.

Størvini verða sett skjótast gjørligt. Lønin verður sambært sáttmála millum AFF og SFS.

Størvini eru nærri lýst á www.sparikassin.fo

Áhugað kunnu seta seg í samband við Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðara á tel. 34 85 10 ella á e-mail *marjun.eystberg@ sparikassin.fo*

Skrivlig umsókn skal vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi mikudagin tann 26. mai 2004.

Send umsóknina til:
FØROYA SPARIKASSI
Att.: Starvsfólkadeildin
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI

**Vika 21 – 19. mai**
Vinnaratøl: 02 - 14 - 19 - 32 - 42 - 44

Eykatøl: 27 - 41

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | 3.642.3912,- kr. |
| 5 vinnarat.+ eykatal | 161.812,- kr. |
| 5 vinnaratøl: | 4.823,- kr. |
| 4 vinnaratøl: | 135,- kr. |
| 3 vinnaratøl: | 42,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum


**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**

Leygardagin 22.05. kl. 19³⁰
Leygardagin 22.05. kl. 23⁰⁰
Sunnudagin 23.05. kl. 19⁰⁰
Sunnudagin 23.05. kl. 22³⁰




Leygardagin 22.05. kl. 21¹⁵
Sunnudagin 23.05. kl. 20⁴⁵

Leygardagin 22.05. kl. 23³⁰
Sunnudagin 16.05. kl. 23⁰⁰




Leygardagin 22.05. kl. 18³⁰
Sunnudagin 16.05. kl. 18⁰⁰

**KOMANDI FILMUR**




**Heimsfrumsýning – Forsølan er byrjað**
Fríggjadagin 28.05. kl. 20¹⁵
Fríggjadagin 28.05. kl. 23⁰⁰

**BIO KIOSKIN**
**Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**